

Snotuliga og snøgga flaggskipið í Thor-flotanum, Thor Magni kemur fyri fyrstu ferð til Føroya í morgin. GS

# Nýggja Thor Magni á Havnina mikumorgun

**Jan Müller**

09.06.2015 - 10:26

Oljan.fo

Snotuliga og snøgga flaggskipið í Thor-flotanum, Thor Magni, kemur fyri fyrstu ferð til Føroya í morgin, ávegis til Kanada.

Thor Magni, sum er eitt av nýggju skipunum hjá Thor, kemur á Havnina kl. 7 mikumorgunin. Skipið er ávegis til Kanada, har tað skal arbeiða komandi mánaðirnar, og kemur til Føroya at gera nøkur smá arbeiði og at taka útgerð.

Frá kl. 15:00 til 17:00 verður høvi at vitja umborð, hjá almenninginum, har øll eru hjartaliga vælkominsigur Thor á heimasíðu síni.

Kl. 17 siglir skipið ein túr norður í Sundalagið, har innboðin eru bjóðað við.

Seinri um kvøldið verður farið víðari til Kanada.

Thor Magni er tað fyrsta av fýra skipum, sum Thor letur byggja í Turkalandi. Skipið varð navngivið og latið eigarunum í februar og fór stutt eftir tað til arbeiðis í Norðsjónum. Nú um dagarnar varð næsta skipið navngivið, Thor Modi. Í summar verður trijða skipið klárt og seinni í ár fjórða skipið. Øll skipini eru langtiðarleigað til seismikkreiðaríið PGS, sum skilst er sera væl nøgt við skipið.